VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av ymsum ættum og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.



Veðrið hósdagin:
Hann veksur vindin upp í skrið ella storm av landsynningi og suðri og regn. Út á seinnapartin hvassur vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Fyrst lot til andøvsgul av ymsum ættum, sunnudagin upp í ein strúk av útnyrðingi. Ælingur, partvís kavi og hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

ingarnir o n s an

Fríðka um egnan skúla

Nakrir næmingar, sum hava valt miðlabreyt í 10. flokki, fáast í løtuni við at fríðka um veggirnar uttanfyri evnisstovuna í Kommunuskúlanum. Hetta er liður í miðlabreytini, sum eitur listabreyt, og hava tey fyri stuttum havt litlæru og kompositión, og er arbeiðið við at prýða veggirnar framhald av hesi læru

SKÚLABREYT
Ingrid Bjarnastein
Birita Simonsen
Jóna Thomsen

Fyrra hálvár í ár hava næmingarnir vitja listaframsýningar, havt vitjan av listamanni, lært um kompositión og litlæru. Nú er tíðin komin til tað meira handaliga. Tað, sum næmingarnir gera nú, er at prýða veggirnar uttanfyri evnisstovuna í Kommunuskúlanum, frá gólvlista til loftslista. Evnið á veggjamálningunum er »Hugflog«.

– Ein av næmingunum er sjálvur komin við uppskotinum um at prýða veggirnar, og tað hava tey so fingið loyvi til, sigur Tonni Strøm, lærari á listabreytini.

Breytin er sett upp til 12 tímar um vikuna. Seks tímar hvønn mánadag og fríggjadag. Fyrsta hálva árið hava tey so gjøgnumgingið ymisk evnir, sum tey nú seinni fara at djúpa seg í. Til dømis er talan um portretttekning, oljumáling, flætta við jarni, keramik, teldugrafikk og annað, sum næmingarnir nú fáa loyvi at seta seg meira inn í. Hvør næmingur velur sær eitt evni.

– Øll eru við í arbeiðinum, tey eru eisini ógvuliga kreativ, greiðir Tonni Strøm víðari frá. – Tey eru tó kreativ á ymsar mátar. Teimum nýtist ikki at duga endiliga at tekna ella mála fyri at sleppa á listabreytina, ið er eftir egnum ynski, og tey duga væl, og haraftur hava nógv av teimum listarligar gávur.

Áhugi fyri at mála

Tá ið vit spurdu næmingarnir, hví teir høvdu valt listabreytina, søgdu teir flestu, at tað var tí at teir vóru sera áhugaðir í list. Teir hava gjørt nógv ymiskt, sum til dømis at arbeiða við leiri, tekna, mála nakrar veggir, teldugrafikk og oljumáling.

– Okkum dámar væl at hava listabreyt. Tað er sera áhugavert og stuttligt, siga næmingarnir í 10. flokki.

– Eftir at hava verið í somu breyt í eitt hálvt ár, kennast vit nú so væl, at vit kenna okkum sum eina stóra familju, sigur ein av gentunum við einum stórum smíli.

Næmingarnir siga okkum at tað er ógvuliga spennandi at prýða veggirnar í evnisstovuni. Teir eru allir glaðir fyri at hava valt hesa breyt.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷20
Nuuk	–
Qaqortoq	–
Ammassalik	–
Saint John's	÷7
Halifax	÷2
Reykjavík	÷6
Seyðisfjørður	÷1
Tórshavn	6
Lerwick	5
Aberdeen	3
London	9
Tromsø	2
Bergen	4
Oslo	–
Stokkhólm	5
Keypmannah.	6
Helsinki	1
Moskva	2
Berlin	10
Warzawa	11
Kiev	7
Bukarest	0
Paris	10
Madrid	9
Róm	13
Malorca	15
Athen	15
Malta	14
Tunis	18
Beijing	9
New Dehli	19
Bangkok	32
Jakarta	28
Sydney	–
New York	5
Miami	20
Los Angeles	17
Meksikobýur	20
Panama	30
La Paz	10
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 967 hPa. vestan fyri Skotland fer eystureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 985 hPa. í útsynning úr Íslandi fer somuleiðis eystureftir og grynnist.

Eitt djúpt lágtrýst, 958 hPa. á 53N-43V fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið hðani verður við Føroyar hósdagin við nógvum vindi og regni.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 05/02 kl. 06⁰⁰– 06/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 8,0 mm – mált frá 05/02 kl. 06⁰⁰– 06/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 30,4 mm

VESTFALLSKYRRINDI

30. januar: Mánin næstur jørðini
4. februar: Seinna kvarter
12. februar: Tendring
14. februar: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar—/ Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna—sundi fp.	sp.	Mykines—firði fp.	sp.	Nólsoyar—firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna—sundi fp.	sp.	Fugloyar—firði fp.	sp.
6. feb	01.57	14.22	00.57	13.22	01.12	13.37	03.57	16.22	04.57	17.22	00.12	12.37	11.37	—	02.12	14.37	03.12	15.37	01.42	14.07	02.57	15.22
7. feb	02.47	15.13	01.47	14.13	02.02	14.28	04.47	17.13	05.47	18.13	01.02	13.28	00.02	12.28	03.02	15.28	04.02	16.28	02.32	14.58	03.47	16.13
8. feb	03.38	16.04	02.38	15.04	02.53	15.19	05.38	18.04	06.38	19.04	01.53	14.19	00.53	13.19	03.53	16.19	04.53	17.19	03.23	15.49	04.38	17.04
9. feb	04.29	16.54	03.29	15.54	03.44	16.09	06.29	18.54	07.29	19.54	02.44	15.09	01.44	14.09	04.44	17.09	05.44	18.09	04.14	16.39	05.29	17.54

5 707265 100036 >